## Eimskip keypir Versacold

Tað er ikki bara Smyril Line, sum stendur á ynskilistanum hjá íslendska felagnum Eimskip. Sambært Morgunblaðnum hevur dótturfelagið Eimskip Holding Inc. boðið upp á stóru kanadisku fyritøkuna Versacold. Boðið er sambært blaðnum umleið seks mia. krónur í okkara pengum. Versacold er heimsins størsta køli- og frystifyritøka og hevur umleið 180 goymslur kring heimin. Eimskip fær svar um ein mánað, skrivar blaðið.




## Royndi at keypa Smyril Line

Stóra íslendska flutningsfelagið Eimskip, sum fyri nøkrum árum síðan keypti Skipafelag Føroya, hevur í seinastuni roynt at fingið fatur í Smyril Line. Tað skrivaði Dimmalætting í gjár, sum tó ikki hevur søguna váttaða nakrastaðni frá.

Blaðið sigur seg tó vita frá álítandi keldum, at tríggir íslendingar hava verið í Føroyum við tí fyri eyga, at fáa fatur á partapeninginum í Smyril Line.

Hetta eydnaðist tó ikki, tí hvørki TF Holding ella Framtaksgrunnurin, sum til samans eiga meira enn helmingin av partapeninginum, vildu selja. Sostatt er meirilutin av partapeninginum framvegis á føroyskum hondum.

# Sølupláss til matvørur í Vágsbotni

**Nú skal tað gerast høgligari hjá monnum at selja matvørur í Vágsbotni. Býráðið hevur samtykt eina ætlan, ið umfatar sjey sølubásar. Farið verður undir arbeiðið um stutta tíð**

SØLUPLÁSS
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur í langar tíðir verið vanlig sjón, at menn standa í Vágsbotni og selja fisk og fugl. Serliga í nátatíðini er stórt virksemi á økinum.

Nú er eisini vanligt, at selt verður úr bilum, summir standa í Vágsbotni, aðrir á Vaglinum. Men nú krevur tíðin og serliga matvørulógin, at eitt ávíst reinføri er til staðar, og økið í Vágsbotni lýkur ikki hesi krøv.

Heilsufrøðiligastarvsstovan hevur boðað kommununi frá, at um plássið skal nýtast til sølupláss, skal tað góðkennast til sølu av matvørum, og hetta skal gerast sambært galdandi krøvum.


*Nú skulu opnu kørini skiftast út við yvirdekkaðar plintar*

Hetta er eitt mál, ið hevur ligið leingi á láni, tí longu í 2003 tók hetta seg upp. Síðani tá er fyrst skitsuprojekt og kostnaðarmeting gjørd, umframt at málið hevur verið til hoyringar hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni og hjá Tórshavnar Havn.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur síðani givið loyvi til søluplássið við tveimum treytum. Týning av skaðadjórum skal fara fram, og til hetta skulu sonevndir rottukassar setast upp fram við kaiøkinum. Og í øðrum lagi skulu vesifasilitetir útvegast til sølufólkið. Við øðrum orðum skulu hesir ikki verða almennir.

### Tilboð innkomin

Umsitingin mælir til, at hesir vesifasilitetirnir verða gjørdir í húsunum hjá bátafelagnum.

Somuleiðis var mælt til, at byggingin fór fram í stigum, har fyrsta stig er teir 8 yvirdekkaðu plintarnir og vesi til sølufólkið.

Tilboð eru komin inn til fyrsta byggistig, og var J. B. Kyster lægstir við sínum tilboði, sum ljóðar upp á 2.800.440 krónur uttan MVG.

Næsta byggistigið er mett at kosta 1,5 milliónir, so samlaða verkætlanin fer at liggja um 4,5 milliónir krónur. Býráðið játtaði á fundi seinasta hóskvøld 2,4 milliónir til verkætlanina, hetta umframt ta einu milliónina, ið framman undan er játtað.

Farið verður fyrsta dagin undir arbeiðið.

## Býráðið yvirtekur Badmintonhøllina

**Havnar Badmintonfelag hevur heitt á býráðið um at tað yvirtekur Badmintonhøllina, og hetta samtykti býráðið á fundi hóskvøldið**

BÝRÁÐIÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Havnar Badmintonfelag hevur í vetur vent sær til Tórshavnar Býráð við fyrispurningi um at kommunan yvirtekur Badmintonhøllina. Høllin er í vánaligum standi, og bráðneyðugt er við umvælingum, serliga á tekjuna.

Skuldin í høllini er 1,2 milliónir, og kommunan leigar sum er part av høllini til Frítíðarskúlan og goymsluhøli til húsaumsitingina fyri 22.000 krónur um mánaðin.

Reglugerð er gjørd fyri høllina, og tað verður hallarleiðarin á Hálsi, sum fer at umsita Badmintonhøllina eisini.

Býráðið samtykti á fundinum hóskvøldið, at yvirtaka høllina fyri 1,1 millión krónur. Yvirtøkan fer fram pr. 1. januar 2008, og peningur verður settur av á fíggjarætlanini fyri komandi ár at umvæla høllina fyri.

*Býráðið yvirtekur Badmintonhøllina 1. januar 2008*



# Dansifrøi fær tak yvir høvdið

**Á býráðsfundi seinasta hósdag samtykti býráðið endaliga, at veita Dansifrøi stað at byggja á og ein trivaligan stuðul**

BYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Longu í 2002 byrjaði Dansifrøi arbeiðið at útvega felagnum eini hóskandi høli.

Saman við fimleikafelagnum Ljósinum søktu teir um at fáa ávíst hóskandi stað at byggja eina høll á, og upprunaliga varð tosað um eitt øki úti í Marknagili. Hendan ætlanin varð tó seinni slept, og øki í Gundadali síðani ávíst.

Seinni aftur tók Ljósið seg úr verkætlanini soleiðis, at Dansifrøi gjørdist einsamalt um høllina. Ein reviderað skitsuverkætlan bleiv síðani gjørd, sum samstundis merkti, at kostnaðarmetingin fór úr 16,5 niður í 9,5 milliónir krónur við MVG.

Fyri býráðið hevði tað týdning, at teir eisini fingu nýtslurætt til eitt nú ungdómsdans, og at onnur viðurskifti í sambandi við bygningina, til dømis parkeringspláss og annað, var í lagi..

Eitt sindur av iva hevur verið um, hvar dansihøllin skuldi byggjast. Upprunaætlanin var sum nevnt úti í Marknagili, men hetta varð seinni flutt í Gundadal. Fyrsta uppskotið har var at byggja millum ítróttarhøllina á Nabb og Gundadalshøllina, men umsitingin metti, at tað fór at gerast ov trongt, tá Tórsvøllur skal byggjast út.

### Trivaligan stuðul

Síðani kom uppskot um at leggja høllina omanvert høllina á Nabb, men hetta uppskotið fall kortini á býráðsfundinum hóskvøldið. Nú er málið kortini endaliga avgreitt, og býráðsfundurin staðfesti, at byggjast skal sum ætlað millum báðar ítróttarhallirnar í Gundadali.

Eisini var endaliga avgreitt, at Dansifrøi fær 60% av kostnaðinum í stuðli frá býráðnum. Vanliga verður latið 30% í stuðli, men av tí at landið als ongan stuðul letur, gjørdi býráðið av at lata tvífalt so nógvan stuðul sum vanligt. Tað vil siga 5,7 milliónir, sum skal latast yvir fimm ár.

So nú er alt greitt hjá Dansifrøi at fara undir byggingina.